# Annika fingið starv hjá ST í New York

**Annika Smith, sum tað seinasta hálva annað árið hevur starvast hjá Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi, hevur nú fingið nýtt starv á ST-høvuðsborgini í New York, har hon m.a. skal vera ráðgevi og samskipa tiltøk fyri upprunafólk**

STARV
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Annika Smith, sum er dóttir Josefinu Smith, byrjar í nýggja starvinum um mánaðarskiftið januar-februar*

Síðani Annika Smith fyri umleið hálvum øðrum ári síðani fekk prógv sum cand. scient. soc. á universitetinum í Ålborg, hevur hon starvast hjá Norðuratlantsbólkinum. M.a. hevur hon verið skrivari hjá grønlendska fólkatingsmanninum Kuupik Kleist og verið við til at gjørt kanningina um føroyingar í Danmark.

Men nú gongur Annika Smith nýggjar leiðir. Mánadagin fekk hon at vita, at hon hevði fingið starv á ST-høvuðsborgini í New York fram um 43 aðrar umsøkjarar.

Upptøkutreytirnar vóru serligar, og tá Annika Smith fór til samrøðu í danska uttanríkismálaráðnum, bleiv tosað við hana á bæði enskum, fronskum og sponskum gjøgnum sonevnda videosamrøðu. Tvs. at Annika Smith sat í Keypmannahavn, meðan hini sótu í New York, og tey sóu hvønn annan á sjónvarpsskíggja.

Nýggja starvið hjá Anniku Smith er eitt sokallað JPO-starv, tvs. eitt slag av juniorserfrøðingastarvi, har Annika skal arbeiða í fasta foruminum fyri upprunafólk hjá Sameindu tjóðum í 1-2 ár sum ráðgevi. Uppgávan hjá henni verður m.a. at fyrireika árligar fundir fyri upprunafólk, eftirmeta menningarætlanir og gera kunningararbeiði.

### Upprunafólk

Annika Smith skrivaði serrit á universetinum um donsk áhugamál í Føroyum og støðu Føroya í danska ríkinum, men hon sigur kortini, at føroyingar verða ikki bólkaðir sum upprunafólk. Hinvegin verða grønlendingar mettir sum upprunafólk.

Spurd, hvørjar allýsingar ella definitiónir verða brúktar um upprunafólk, sigur Annika Smith, at tað er misjavnt, men at hesi fólk ofta sjálv rokna seg sum upprunafólk. Eini 300 til 350 fólk ella tjóðir í heiminum verða mett sum upprunafólk, og tey búgva í umleið 70 londum.

Ofta er talan um fyrrverandi hjálond ella lond, ið eru í einhvørjari postkolonialari støðu og hava serlig mentanarlig og málslig eyðkenni.

Hesar lýsingar kundu kanska eisini verið nýttar um føroyingar, men hinvegin geva hesi eyðkenni ikki beinleiðis atgongd til sjálvstýri ella onnur líknandi rættindi.

### Til gagns fyri Føroyar

Annika Smith hevur sum nevnt higartil arbeitt hjá Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi, men hóast hon sigur seg gleða seg nógv til tað nýggja starvið, vónar hon, at hon framvegis kann varðveita tilknýtið til Norðuratlantsbólkin.

Hon sigur, at umframt, at hetta sjálvandi er ein góður kjansur hjá sær at fáa, so metir hon eisini, at Føroyar kunnu fáa gagn av hesum. Umframt at fáa størri royndir og innlit í minnilutaspurningar í ST-skipanini og altjóða lóg, heldur Annika Smith eisini, at vit kunnu fáa betri innlit í, hvussu vit skapa dialog millum minnilutar og limalond, og tað sigur hon seg vera spenta uppá.

# Vónin keypt part av Hampiðjuni

**P/F Vónin hevur keypt 22% av partapeninginum í størsta íslendska nóta- og trolvirkinum**

VINNULÍV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Við nærum einum fjórðingi av ognarpartinum í Hampiðjuni, er Vónin av álvara farin inn á íslendska marknaðin*

Í tíðindaskrivi sigur Hjalmar Petersen, stjóri, at hetta er eitt neyðugt stig, til tess at tryggja framburðin hjá virkinum.

– Um vit skulu gera okkum galdandi innan hesa vinnu, eru vit noydd at hyggja út um landoddarnar. Kappingin er hørð, so í veruleikanum er valið at verða keyptur upp ella at keypa upp. Vit hava valt tað seinna. Hetta er ein vinna, sum vit føroyingar eiga at gera okkum galdandi í, og vit vóna, at hetta fer at eydnast.

Í dag starvast um 80 fólk á Vóinini. Umframt virksemið í Fuglafirði, Tórshavn og Norðskála hevur Vónin eisini virksemi í Grønlandi og New Foundlandi.

Hampiðjan er við einum marknaðarparti á 75% nógv størsti framleiðari av nótum og trolum í Íslandi. Hartil hevur felagið virksemi í fleiri øðrum londum. Ikki minst í baltisku londunum.

Við keypinum er Vónin næst størsti partaeigarin í íslendska felagnum. Størsti partaeigarin er Vogun, sum eigur góð 28% av partapeninginum.

